Tiltøk

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 fundur, har Dan Jacobsen talar og greiðir frá kristniboðsvirki í Mongolia.

Meinigheitin í Hoyvík
Í dag frá kl. 6–7: Bøn hjá Oddmar og Gunnvør, Heinagøtu 1.
Vikuskiftismøtir í Hoyvíkar skúla: Í kvøld kl. 21: Ungdómsmøti, har luttaka m.a. Ungdómskórið í KFUM, Tabalja saman við øðrum og Absalon Árgarð saman við dukkudreinginum. Møti leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18, har Eivin Frøen úr Norra ella Gordon Hickson úr Onglandi fara at tala. Veri øll hjartaliga vælkomin.

Páskastevna í Havn
Páskastevnan verður í Ítróttarhøllini á Nabb, har Eivind Frøen úr Norra og Gordon Hickson úr Onglandi tala, og Jan Honningdal úr Norra fer at luttaka við sangi. Verið øll hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 6: Morgunbøn. Í kvøld kl. 21: Ungdómsmøti. Í morgin kl. 6: Morgunbøn. Í morgin kl. 17: Landsbøn. Sunnudagin kl. 6: Morgunbøn. Sunnudagin kl. 11: Morgungudstænasta. Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Hjørdis og Dánjal Petersen. Sunnukvøldið kl. 22: Útimøti (um viðrar).

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygardagin kl. 15. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Í kvøld kl. 20.30: Ungdómsklubbur.
Pálmasunnudag: kl. 11 møti, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18: Møti við ungdómi av Argjum. Innsavnan til kirkju og barnaheim í Peru.

Rhema á Hálsi
Í kvøld kl. 18-19: Atap Kids.
Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 6.
Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagsskúli kl. 14. Møti sunnukvøldið kl. 18, Manskórið skipar fyri. Innsavnan til ytrimissión.

Landsbókasavnið
J. C. Svabosgøta 16
Vibeke Schaffalitzky og Inger J. Hildershavn halda »Ein tími við Bíbliuni« mánadagin 17. apríl kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið møti kl. 20, vitjan av Eivind Frøen og Gordon Hickson.
Sunnudagin kl. 17: Møti við Eivind Frøen og Gordon Hickson. Barnamøti kl. 17.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

Leirvíkar Blákrossfelag
Aðalfundur verður í Missiónshúsinum í Leirvík mánadagin 1.5.200 kl. 19.30.

Møtiskrá
fyri Føroyatúr hjá Hera Elttør, trúboðara:
14.-15. apríl: KFUM&K í Klaksvík.
16. apríl: Hvannasund
18. apríl: Tabor í Fuglafirði.
19. apríl: Sandavágs Missiónshús.
20. apríl, skírishósdag: Glyvra Missiónshús.
21. apríl, langa fríggjadag: Meinigheitshúsið í Tórsh.
23. apríl, páskadag: Gudstænastu á Skála. Á páskastevnu á Strondum um kvøldið.
24. apríl, 2. páskadag: í Skálavík.
25. apríl: Meinigheitshúsið í Tórshavn.
27. apríl: Missiónshúsið á Argjum.
30. apríl: Á Skála.

Frelsunarherurin, Vági
Páskastevna verður í Framtíðini í Vági frá 20. til 24. apríl.
Ymiskir talarar. Vitjan av Irenu og Eyðun Christiansen, Major Inger Sofie Tjåland o.ø. úr Tórshavn.

Tvøroyrar Missiónshús
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 21 við luttøku av Skála.
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Jens Vestergård og fleiri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11. Sunnudagin kl. 13.30: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.
Týsdagin: Ungdómsfundur.

Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

AA-fundir í Havn
Reinsarfið, Tórsgøta 5: Í kvøld kl. 20–21 og kl. 22.30 –23.30.

Al Anon fundir
er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21 á Reinsarínum í Havn.

AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt **mánakvøld** á skrivstovuni hjá Bláa Krossi **á Glyvrum,** kl. 20–21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 19.00 til 21.00. Tlf. 212380.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Losjan í Havn
Í dag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Sinnisbati
»Virðing fyri teim psykisk sjúku« er heitið á almennum fyrilestri, sum Jóhanna Andreasen, sjúkrasystir, hevur í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c, leygardagin 15. apríl kl. 15. Øll eru vælkomin.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða nátturði «Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Felagið Føroyar-Kuba
Skrivstova og felagshøli felagsins er í Bringsnagøtu 10, Tórshavn. Opið er hvørt mikukvøld kl. 19.15-20.15.
Postadressan er:
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf. 313016 og 312098. Fax 313016.
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com

Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Giktafelag Føroya
tlf. 44 48 03 fax 44 51 04
e-mail: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan í MBF húsinum hevur opið mánadag frá 14.00 til 16.00, tlf. 310237 ella støkk inn á Íslandsvegi 10 C, Tórshavn.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum, Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 45 73 37 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 37 31 06 eftir skúlatíð, ella e-mail: sara@post.olivant.fo

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan í N. Finsensgøtu 32, tlf. 314827, fax 310557 er opin soleiðis:
mánadag er stongt,
týsdag kl. 10-12,
mikudag kl. 10-12,
hósdag kl. 10-14,
fríggjadag kl. 10-12.
Frítíðarklubbin hevur ymiskar aktivitetir í kjallaranum hjá Javna. Nærri fæst at vita um hetta, við at venda sær til skrivstovuna.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Sosialráðgevin er at hitta hvønn mánadag millum kl. 10.30-12.
Ring og avtala tíð á tlf. 31 73 73.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Sjómansheimið Ørkin
Reykjavík
tlf. 354-5680777
Møti eru hvønn sunnudag kl. 15.00.

Føroyskt møti í Árhus
Føroyskt møti verður í missiónshúsinum í »Carmel« (Klosterport 6) leygarkvøldið 15. apríl kl. 19.30 v/ Símun Jacobsen. Eftir møti verður kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.00.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Ossuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Sunnudagsskúli í Keypmannahavn
Sunnudagsskúli er hvønn sunnudag kl. 14 á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade, og í Eliaskirkjuni, Vesterbrogade 49. Øll eru hjartaliga vælkomin. Meira fæst at vita frá Jan Johannessen,
tlf. (0)43623737-1502.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroysku gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/ 26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Øldusló´ð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
Húsið er opið soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Ráðgevingin fyri Føroyingar í Danmark
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark veitir ráð og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir: má.tý. hó. kl. 11.30–15.30, mik. kl. 14.00–18.00.
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark,
Vesterbrogade 17 A,
1620 Kbh. V,

Føroyingar í Noregi
E-mail:
foroyar@norden.no
Heimasíða:
http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Óslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Gullbrúdleyp

Sunnudagin 16. apríl hava hjúnini Jona og Eivind Gudmundsen, Sandavági, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Heimasíða:
www.faroehouse.dk
E-mail: postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir:
mánadag–fríggjadag:
kl. 14.00–19.00.
13.–14. apríl: Íslendingar framføra sjónleik kl. 20 bæði kvøldini.
15. apríl: Barnadagur kl. 12–17.
15. apríl: Dansur um kvøldið. Róðrarfólkið í Ballerup-felagnum skipar fyri.

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48 D
8000 Århus C
Telefon og fax: 86180604
Teldupostur:
aarstova@teliamail.dk
Heimasíðan:
http://welcome.to/aarstova
Aarstova er opin soleiðis:
Café Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Føroysku bløðini liggja frammi.
Fríggjakvøldsbarr: kl. 21-03

VALUTAKURSIR

		13.04.00	Ultimo mars
USA	**Dollarar**	778,1300	778,9500
Bretland	**Pund**	1236,8900	1243,2800
Týskland	**Markur**	380,9000	380,7100
Svøriki	**Króna**	89,8500	89,7900
Noreg	**Króna**	91,3300	91,9900
Frakland	**Frankur**	113,5700	113,5100
Belgia	**Frankur**	18,4680	18,4580
Sveits	**Frankur**	472,7600	467,8900
Holland	**Gyllin**	338,0600	337,8800
Italia	**Liri**	0,3848	0,3846
Finnland	**Markur**	125,3000	125,2300
Ísland	**Króna**	10,5800	10,5700
Eysturríki	**Skillingur**	54,1400	54,1120
Spania	**Pesetas**	4,4770	4,4750
Portugal	**Escudos**	3,7160	3,7140
Kanada	**Dollari**	532,0900	535,4500
Grikkaland	**Drakmur**	2,2230	2,2250
Japan	**Yen**	7,3586	7,4119
Írland	**Pund**	945,9300	945,4500
	Evra	744,9800	744,6000

FØROYA SPARIKASSI

Sí eisini SvF tekstvarp s. 611–613

Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-.
Onnur reglulig tiltøk í Áarstovu:
MFS. Meginfelag Føroyska Studenta hevur opið hvønn mikudag kl. 16-18.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag kl. 11-14 (ólíka vikur).
Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).
Bókasavn. Føroyskar bøkur kunnu lánast mánadag-hósdag kl. 16-18.
Ítróttartiltøk:
Flogboltur. Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur nr. 4.
Svimjing. Frydenlundskúlin fríggjakvøld kl. 18-19. Bussur nr. 4.
Fótboltur. Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur nr. 15.

Vika 15 - 12. apríl
Vinnaratøl: **02 - 19 - 21 - 28 - 34 - 44**
Eykatøl: **17 - 32**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnarat.+1 eykat.:	**74.352,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.245,- kr.**
4 vinnaratøl:	**109,- kr.**
3 vinnaratøl:	**28,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

HAVNAR BIO

Mission to Mars

Eitt summarkvøld í 2020 sita tríggir vinmenn og hyggja upp í himmalin.
13 mánaðir seinni lendir ein av teimum, Graham, á Mars, har farið verður undir at gera kanningar av planetini.
Hinir báðir eru við í verkætlanini, men arbeiða á jørðini.
Stóri spurningurin er, um menniskjan kann liva á Mars.
Rúmdarfarið, sum lendir á Mars, verður burtur, og so mugu tey, sum eru á Mission Control á jørðini, mannað eitt nýtt far, sum skal leita eftir Mars 1.
Tað verða teir báðir vinmenninir, sum vórðu eftir á jørðini, sum skulu til Mars at leita eftir Graham, og tað spyrst ein spennandi ferð – og filmur – burtur úr.

Pokémon

Pokémon er ein animeraður ævintýrfilmur, ið er bygdur á væl umtóku japansku sjónvarpssendirøðina við sama navni. Filmurin gonur fyri seg í einum fantasiheimi við fantasiíbúgvum, ið kallast Pokémon. Hesi hava hvør í sær sín heilt egna serligan eginleika.
Filmurin er í tveimum pørtum. Fyrri parturin kallast »Pikachu ferðast« og er ein stutt innleiðing í Pokémon alheimin. Umframt Pikachu hitta vit millum annað Squirtle, Pidgetto, Blastoise, Raichu og Marowak. Vit uppliva teirra ynsku eginleikar, hvussu ymisk tey eru og teirra fitta og kappingarsinnaða lyndi.
Seinni parturin er meira merktur av action. Hann kallast »Pokémon filmurin«, og í honum fylgja vit Ash, Pikachu og øllum vinum teirra, tá tey fara til oynna New Island, ið liggur langt burturi.
Á oynni verða tey lokkað í ein stóran Pokémon bardaga, ið krevur alt teirra dirvi og alla teirra megi…



Frumsýning
Fríggjadagin 14.04. kl. 21[00] Fríggjadagin 14.04. kl. 23[30]
Leygardagin 15.04. kl. 21[00] Leygardagin 15.04. kl. 23[30]
Sunnudagin 16.04. kl. 20[00] Sunnudagin 16.04. kl. 22[30]
Mánadagin 17.04. kl. 20[00] Mánadagin 17.04. kl. 22[00]

HAVNAR BIO
✶ Tlf. 311956 ✶

Frumsýning
Fríggjadagin 14.04. kl. 17[00] Fríggjadagin 14.04. kl. 19[00]
Leygardagin 15.04. kl. 17[00] Leygardagin 15.04. kl. 19[00]
Sunnudagin 16.04. kl. 16[00] Sunnudagin 16.04. kl. 18[00]
Mánadagin 17.04. kl. 18[00]

Fríggjadagin 14.04. kl. 18[00]
Leygardagin 15.04. kl. 16[30] Leygardagin 15.04. kl. 18[30]
Sunnudagin 16.04. kl. 16[15] Sunnudagin 16.04. kl. 18[15]
Mánadagin 17.04. kl. 17[30]



Fríggjadagin 14.04. kl. 20[30] Leygardagin 15.04. kl. 20[30]
Sunnudagin 16.04. kl. 20[15] Mánadagin 17.04. kl. 19[30]

Fríggjadagin 14.04. kl. 23[00] Leygardagin 15.04. kl. 23[00]
Sunnudagin 16.04. kl. 22[45] – *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMUR

Mánadagin 17.04. kl. 22[30]